Føroyskt studio í Herlev

Terji Rasmussen, Róin Siggertson og James Olsen húsast undir somu lon í Herlev, har teir hava savna sína upptøku- og tónleikaútger›.

Mynd: Jonhard Hammer

Ein bygningur í Herlev h‡sir trimum føroyskum tónleikarum, sum hava fingi› sera gó›ar umstø›ur at arbei›a undir

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

Tríggir føroyskir tónleikarar hava nú sína dagligu gongd í einum bygningi í Herlev, har teir hava savna› alla sína tónleikaútger›. Herlev liggur stutt uttan fyri Keypmannhavn.

Róin Siggertsson hevur leiga› seg inn í bygningin, sum er 256 fermetrar stórur, og hann hevur lati› Terja Rasmussen og James Olsen pláss burturav.

– Eg havi arbeitt vi› hesum hugskotinum í longri tí›, og tá ta› nú gjørdist veruleiki, vóru James og Terji eisini áhuga›ir at koma inn, og teir hava so leiga› høli frá mær, sigur Róin Siggertsson.

– Vit hava í grundini upptøkuútger› hvør í sínum lagi, men vit ælta at samstarva um upptøkur og framlei›slu av tónleiki. Hetta er so n‡tt, og tí er ta› rættiliga opni›, hvussu vit fara at samstarva, men vit eru sinna›ir fyri øllum møguleikum, sigur Terji Rasmussen.

Hugsar um Danmark

Róin Siggertsson hevur fingist nógv vi› tónleik, sí›ani hann var heilt ungur. Hann hevur spælt nógv, gjørt sín egna tónleik, og hann hevur produsera› tónleik fyri onnur – millum anna› Tónar, Randarsól og ein írskan bólk, sum kallast Catcher.

– Mín tanki er at royna at koma longur vi› tónleikinum hjá mær. Eg havi givi› tónleik út í Føroyum, men ta› freistist eg ikki so nógv av í løtuni. Eg kundi hugsa mær at fingi› møguleikan at givi› okkurt út í Danmark, sigur Róin Siggertsson.

– Ta› kemur væl vi›, at eg nú havi fingi› so gó›ar umstø›ur at arbei›a undir. Ta› skuldi gjørt møguleikan betur fyri at fingi› okkurt gott burturúr, sigur hann.

– Tá tú fert inn í vanligt studio, er ta› ofta sterilt og ke›iligt, og taxametri› telir frá tí, at tú kemur inn. Ta› kann geva tær nervar, á›renn tú ert byrja›ur at taka upp. Her er stø›an ein heilt onnur, tí eg búgvi her, og øll útger›in stendur klár at brúka døgni› runt.

Øll hugsandi útger›

Terji Rasmussen hevur seinastu árini bú› í Danmark, og har hevur hann gjørt nógv vi› tónleikin.

Me›an hann hevur veri› búsitandi í Keypmannahavn, hava hann og Ey›un Nolsøe givi› eina fløgu út vi› n‡ggjum sangum, umframt at 3'arin júst hevur givi› ein savnsfløgu vi› sangum, sum teir bá›ir hava gjørt gjøgnum tí›ina.

Nú brúkar Terji nógva tí› í Herlev.

– Her er øll hugsandi útger›, sum eitt studio hevur brúk fyri, og tí eru vit førir fyri at taka fløgur upp frá byrjan til enda. Harafturat kunnu vit syrgja fyri, at tónleikur ver›ur ljó›bland-a›ur av royndum ljó›blandara, sigur Terji Rasmussen.

– Her eru møguleikar til at taka demofløgur upp, og her er eisini gjørligt at gera allar a›rar innspælingar. Hetta er rættiliga n‡tt, og tí er ta› púra opi›, hvat vit kunnu brúka hetta studio til, sigur hann.

Undir n‡ggja útgávu

Terji Rasmussen, sum hevur veri› fløguaktuellur fleiri fer›ir seinnu árini, er í holt vi› eina útgávu, sum hann leingi hevur tosa› um.

Talan er um eina barnafløgu vi› tónleiki, hoyrispæli og ø›rum undirhaldi.

– Eg eri farin í gongd vi› hesa útgávuna, og eg vóni, at hon kann ver›a li›ug og koma út á páskum komandi ár, sigur Terji Rasmussen.

Útgávan ver›ur ein CD-Rom, sum skal upplivast á telduni. Umframt tónleikin og hoyrispæl, ver›ur eisini gjørligt at uppliva animatiónir afturvi›, og onkur smáspøl ver›a eisini løgd á fløguna.

– Hetta er eitt rættiliga umfatandi projekt, men ta› er spennandi at fara í holt vi› ta›, sigur Terji Rasmussen.

Spælir nógv

Terji Rasmussen spælir so at siga hvørt vikuskifti í danska høvu›ssta›num. Hann hevur spælt einsamallur og saman vi› Ey›uni Nolsøe á Café Malmø, sum alsamt meira gerst eitt føroyskt vertshús.

Café Malmø liggur í Havnegade mi›skei›is í danska høvu›ssta›num.

– Hvørt fríggjakvøld er okkurt føroyskt tónleikaundirhald, og ta› ger, at nógvir føroyingar leita sær fram vi›. Spæli eg ikki, so er ta› onkur annar føroyskur tónleikari, sum ger ta›, sigur Terji Rasmussen.

Føroyingar hava sína føstu stø› í náttarlívinum í Keypmannahavn, og fríggjakvøld eru ta› alsamt fleiri føroyingar, sum leita sær inn á Café Malmø.

Teir bá›ir føroysku tónleikararnir Róin og Terji avmynda›ir í upptøkuhølinum í Herlev

Nógv at tríva í

Í bygninginum í Herlev er nógvur aktivitetur.

Róin og James búgva har, og ta› ger Terji eisini ein part av vikuni. Ein ketta, sum hevur fingi› navni› Sas Squash gongur og melir millum teir.

Er ta› ikki tónleikur, sum teir sita og arbei›a vi›, so er altí› okkurt at tríva í vi› at smí›a ella fáa upp á pláss.

– Vit hava sera gott pláss, og vit halda, at møguleikarnar fyri at fáa studio rættiliga at virka eru gó›ir, sigur Terji Rasmussen.

– Umstø›urnar eru framúr, og ta› er nógv av plássi. Ætlanin er, at her skal eisini vera møguleiki at taka myndir í einum serligum rúmi, og at gera til dømis kápur og anna› arbei›i í sambandi vi› útgávur, sigur Róin Siggertsson.

-– Alt er ikki klárt enn, men eg havi til dømis fingi› gjørt ein lítlan konsertsal, har møguleiki er at spæla live, og har útger›in altí› stendur tøk.

Arbei›a vi› sínum egna tónleiki

Róin Siggertsson arbei›ir vi› tónleiki undir navninum Sas Quash Productions, og Terji hevur sítt Sightseeing Productions.

Terji hevur ætlanir um at framlei›a og upptaka tónleik fyri onnur, umframt at hann eisini arbei›ir vi› síni egnu barnaútgávu.

Róin ætlar sær at leggja seg meira eftir sínum egna tónleiki.

– Eg havi produsera› rættiliga fitt av tónleiki fyri onnur seinastu tí›ina, men nú havi eg betur hug til at arbei›a vi› mínum egna tilfari. Ta› er eisini ein av t‡›andi orsøkunum til, at eg havi leiga› meg inn í hendan bygningin, sigur Róin.

James Olsen, sum er tri›i ma›ur undir takinum í Herlev, hevur nógv at gera í løtuni. Hann spælir vi› í bólkinum hjá Erann DD, sum er væl umtóktur á danska tónleikapallinum í løtuni.

Róin Siggertson hevur fingist nógv vi› upptøkur av tónleiki seinnu árini. Sjálvur skrivar hann eisini tónleik og spælir.

Mynd: Jonhard Hammer

Terji Rasmussen er farin í holt vi› at gera eina barnafløgu, sum skal upplivast á teldu.

Mynd: Jonhard Hammer

James Olsen hevur nógv at gera í Danmark. Hann spælir saman vi› einum av best umtóktu nøvnunum í løtuni.

Mynd: Jonhard Hammer